UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 22. apríl 2025
J. nr.: 25/09647-2
Viðgjørt:
Tygara skriv:

Svar upp á fyrispurning nr. 52-097/2024 eftir § 52 a í tingskipanini til Margit Stóra, landsstýriskvinnu, frá Jórun Pólsdóttir, løgtingskvinnu, um skjóttgangandi bátar og árin teirra á sjófulgameingið

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. *Eru ætlanir um at regulera ferðslu á sjónum, so at hon ikki er ein bági fyri sjófugl í bútíðini, og um so er, verða atlit tikin til bæði búpláss og veiðipláss?*
2. *Ætlar landsstýriskvinnan at seta í verk kanningar at eyðmerkja týdningarmikil veiðipláss hjá sjófugli?*
3. *Vil landsstýriskvinnan arbeiða fyri at áseta hámarksferð, antin í eyðmerktum støðum ella við ávísari frástøðu úr landi, í bútíðini hjá sjófuglinum?*

Svar til spurning 1
Kunngerð nr. 52 frá 8. apríl 2025 um sigling fram við landi, har fuglur heldur til, er júst lýst við tí í hyggju at verja allan sjófugl móti óneyðugum órógvi kring allar Føroyar. Við hesi kunngerð verða tær reglur, sum higartil bara hava verið galdandi fyri sonevndu Ramsar-oyggjarnar, eisini víðkaðar til at galda fyri sigling fram við landi, har fuglur heldur til kring allar Føroyar.

Høvuðskravið er, at skip og bátar skulu vísa sjófuglinum fyrilit alt árið. Í tíðarskeiðinum frá 15. apríl til 15. august eru strangari krøv. Tá er hámarksferðin fyri sigling undir landi í ávísum økjum sett til 8 sjómíl. Kort eru í kunngerðini, sum vísa, júst hvørji hesi økini eru.

Kunngerðin tekur fyrst og fremst atlit at búplássum hjá sjófugli og í ávísan mun til veiðipláss hjá sjófuglinum. Ymiskt er, hvussu langt sjófuglurin reikar fyri at finna sær føði, og helst er tað ymiskt alt eftir, hvussu gott føðigrundarlagið er undir landi frá ári til ár.

Okkara vitanargrundarlag um veiðipláss hjá sjófuglastovnunum er helst bæði ov lítið og spjatt, bæði í mun til vísindaligar kanningar ella leikmansvitan. Umhvørvismálaráðið hevur í umleið 20 ár latið stuðul til lærd og leikfólk at gera ymiskar kanningar av sjófuglastovnunum, og frágreiðingar eru til skjals frá hesum kanningunum. Kanningar av drunnhvítastovninum úti í Nólsoy hava eitt nú víst, at drunnhvítin flýgur nógvar kilometrar út á hav at leita sær føði um næturnar.

Samanumtikið kann ikki sigast, at serlig atlit verða tikin til veiðiplássini hjá sjófugli, sum eru uttanfyri 500 metrar økini í kunngerðini um sigling, tó so, at kravið um at vísa fyrilit í hesum økjum er galdandi fyri allan sjófugl alt árið.

Svar til spurning 2
Umhvørvisstovan er fakmyndugleiki á náttúru- og umhvørvisøkinum og umsitur eitt nú reglurnar í náttúruverndarlógini og kunngerðareglurnar um sigling. Eg ætli at umrøða spurningin um verju av veiðiøkjum hjá sjófugli við Umhvørvisstovuna, og hvussu skilabest kann farast fram at tryggja eina rímiliga verju.

Svar til spurning 3
Víst verður til svarið til spurning 1 omanfyri um, at reglur um hámarksferð júst eru ásettar fyri at verja sjófuglastovnarnar kring alt landið.

Umhvørvismálaráðið, 22. apríl 2025

Margit Stórá
landsstýriskvinna